# Lýsingatorgið

**TELDA TIL SØLU**
AMD 450 K6-2, 396 SD RAM, Geeforce 4 64 RAM, (grafik kort), Sound Blaster Live 5,1, 4 stk hátalarar við Woffer, 14" Skermur, 4 X Brennara (góður), 40 X CD - Rom, 13,6 GB hardisk (7200 umr), 6,4 GB hardisk (5200 umr), Cannon BJC 250 Litprintari, Microsoft Tastatur & Skroll Mús, U.S. Robotic modem 56K Extern, 10 / 100 Netkort. Win 98 ella Win XP fylgir við og spøl og annað. Verður seld fyri 8.000,-
*Tlf . 262480*

## Tónleikur

**YNSKIST**
Brúkt klaver ynskist til keyps.
*Tlf. 448590*

**TIL SØLU**
FENDER Stratocaster mod. 27-5700 (made in Japan) 2 single-coil og 1 Humbucking pickup, sera væl hildin, til sølu um hóskandi boð fæst, mynd av guitarinum kann mailast eftir ynski.
*René - Tlf. 211438*

**YNSKIST**
Hevur nakar eina harmoniku til sølu fyri sámuligan prís?
*Tlf. 333988 ella 250240*

**EG HAVI**
danskar og útlendskar fløgur, bæði brúktar og óbrúktar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.
*Tlf. +45 86428627 ella +45 26747474*

**HARMONIKA**
av merkinum Parrot til sølu fyri 4.000 kr. Í góðum standi. Góð harmonika at byrja við.
*Tlf. 313888*

**YAMAHA RBX BASSUR**
til sølu. Hálvt ára gamal, ljóðar knasandi væl.
*Tlf. 314912 - 267353*

## Ymiskt

**TIL SØLU**
POWER-STEPPER (til venjing av bein- og fótliðum) ynskist til keyps.
*Ring tlf. 314977 / 254700*

**VINDEYGA**
140 x 140 cm. – óbrúkt, mahogni – til sølu. Nývirði kr. 5.000,-
*Tlf. 314129*

**VINDEYGU VIÐ TERMOGLASI**
3 vindeygu við termoglasi, 120 x 120 til sølu fyri 500,- kr. stk.
*Tlf. 0045 21827606*

**SKEIÐ**
verður hildið í okt. í gerð av kortum og myndum. Seymaði, 3 dv. ella serviettum – um nóg nógv tekna seg. Meir fæst at vita á
*tlf. 315191 ella 215191 eftir kl. 16*

**DIGITAL KAMERA**
Eitt lítið digitalt kamera til sølu fyri 450 kr. Tekur 80 myndir og kann eisini nýtast sum WEB kamera (3 mðr. gamalt) Nýprísur 800 kr.
*Ring 261196*

**SOS SOS!**
Um tú ella tit hava eitt brúkt video og Playstation hampuliga bíliga til sølu, vil eg fegin hoyra frá tykkum.
*Tlf. 443242 - 282280*

**MYNDATÓL**
1 1/2 ára gamalt Minolta Dynax 500si v/3500 xi blitzi, eini Tamron 28-300 mm. aspheriskari linsu og einum óbrúktum stativi. Nýprísur 13.500 kr., til sølu fyri einans 8000 kr.
*tlf. 260590*

**TIL SØLU**
Sony Ericsson T68i – flotta telefonin við litskermi, GPRS, kalendara, infrareyðum porti, spølum og nógvum afturat. Bert 3 mðr. gomul. Virkar perfekt. Til sølu fyri bert 3.400.
*ring 0045 51900522*

**JØRÐ Á SKARÐI!!!**
7 gyllin av jørð fyri innan á Skarði til sølu.
*Tlf. 251681*

**TIL SØLU**
Ein Benefon NMT 450 bíliga til sølu.
*Tlf. 215821*

**OLJUMÁLNINGAR TIL SØLU**
Vestara Vág av Pól Hentze. Tinganes av Pól Hentze 2002. Kavamyndir úr Sandoy, av sama.
*Tlf. 255279*

**FERÐAST SAMAN?**
Er tað nakar, ið ætlar sær til Danmarkar í oktober og steðga í Danmark í ca. 14 dagar? So kunna vit ferðast saman og fáa bíligan ferðaseðil. Vinarliga ring á
*tel. 222079, best eftir kl. 18.*

**FJARSTÝRT FLOGFAR**
til sølu fyri 800 kr. Tað er eitt sindur bygt og hevur motor. Lím og ymiskt annað fylgir við.
*Tlf. 424309, kl. 17–00*

**FLYTIGÓÐS**
Skalt tú flyta niður, so er møguleiki at fáa flytigóðs niður til DK í hesari vikuni.
*Tlf. 265245*

**MIÐVINGAR ÚTI OG HEIMA**
Bygdaveitslan verður 2. november og ikki sum áður lýst 9. november.
*Gleimur*

**FARTELEFON**
Panasonic EB-GD7 5, 4 mánaðir, garantiið á 7 mánaðir fylgir við, til sølu. Nýprísur 2.680,- nú 1.800,-
*Tlf. 253373*

**ER NAKAR**
annar í Føroyum, sum eigur eitt barn við diagnosuni multipel karboxylasemangel? Um so er, vilja vit fegin hava samband við tykkum.
*Tlf. 361960 - 228685, e. kl. 19*

**VIT ERU**
10 børn í 2. flokki, sum søkja eitt høli at vera í seinnapartarnar, saman við 1-2 vaksnum. Hvør hevur ein kjallara ella líknandi at leiga okkum? Tað kann vera allastaðni í Havnini
*Ringið 319818 ella 312313*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Vakur málningur ca. 70 x 60 cm av Beinissvørði - málaður av Bibi Sigmundsdóttir í 1984.
*Áhugaði kunnu ringja tlf. + 4528920245*

**SIEMENS C45**
til sølu fyri hóskandi prís.
*Tlf. 252623*

**ERICSSON T20S**
til sølu fyri hóskandi prís.
*Tlf. 252623*

**TILHOYR**
til gosbað til sølu.
*Tlf. 260334*

**VIKUSKIFTISFERÐASEÐIL**
Føroyar/Aberdeen og aftur til sølu fyri 1.400 kr. Virði 2.272,- kr.
*Tlf. 216089*

**SAMSUNG**
videocamera bíliga til sølu.
*Tlf. 265834*

**ÚTHURÐ**
til altan/terassu, til sølu. Hevur sprossarútar.
*Tlf. 311612*

# Tøknileiðari til SvF

Verandi tøknileiðari okkara leitar nýggjar leiðir og Sjónvarp Føroya søkir tí eftir nýggjum tøknileiðara.

Tøknileiðarin hevur ábyrgdina av viðlíkahaldi, supporti og útbygging av teknisku útgerðini hjá SVF, herundir eisini KT-kervinum. Hann umsitur alt innkeyp av KT- og tøkniútgerð. Hann leiðir dagligu tøkni- og KT-serviseringina av framleiðslu og umsiting. Hann er leiðari fyri tøkni- og KT-vørðarnar í húsinum, umframt fólkið, ið sendir. Somuleiðis stendur tøknileiðarin fyri útbúgving og skeiðvirksemi í sambandi við nýggja tøkni. Sjónvarpið er miðskeiðis í eini umfatandi umlegging av framleiðsluni frá analogari til digitala tøkni.

Tøknideildin er bygnaðarliga partur av framleiðsludeildini, ið samskipar og leggur tilrættis alla framleiðslu sjónvarpsins. 4 størv eru normeraði beinleiðis undir tøknileiðaranum.

**Útbúgving og royndir:**
Útbúgving innan KT- ella samskiftistøkni, ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Gott innlit í nýggjastu KT- og samskiftistøknina. Aðrar viðkomandi útbúgvingar og arbeiðsroyndir.

Royndir við arbeiði innan loftmiðlatøkni er ein fyrimunur, men eins stóran týdning hevur hollur kunnleiki til samskiftis- og KT-tøkni, og at tú hevur evnini at seta teg inn í nýggja tøkni og nýggjar uppgávur, analysera arbeiðsgongdir og finna og laga tøkniligar loysnir til tørvin í dagliga arbeiðinum hjá ymiskum starvsbólkum. Vit vænta okkum harumframt, at tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevni.

Fyri tann rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi starv, har tú hevur møguleikan at vera við at menna nýggjar loysnir og arbeiðshættir fyri stovnin komandi árini. Sjónvarpið sum miðil stendur framman fyri kollveltandi tøkniligum avbjóðingum, har nógvir nýggir møguleikar fyri samskifti við brúkaran standa í boði. Sum tøknileiðari verður tú við til at ávirka, hvørjar loysnir og hvørji tøknilig tilboð til hyggjaran, ið Sjónvarp Føroya skal leggja dent á í framtíðini.

**Løn og setanartreytir:**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Miðað verður eftir at seta starvið frá 1. november, 2002, ella skjótast gjørligt.

Umsóknir við CV, prógvum og viðmælum verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 1. oktober, 2002.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóra ella Jónheðin Tróndheim, tøknileiðara á telefon 340400.

Sjónvarp Føroya

*Sjónvarp Føroya er sjálvstøðugur stovnur undir landinum, sum mótvegis borgarunum hevur skyldu til at útvarpa sjónvarpssendingar, ið fevna um tíðindi, upplýsing, mentan og undirhald. SvF fíggjar sjálvt rakstur sín. Inntøkurnar stava frá hyggjaragjaldi umframt handilsligum virksemi.*

team85

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 3. oktober 2002, kl. 10.45** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir ognina **matr. nr. 1115, Klaksvík (AS nr. 2-7/2002).**

Talan er um sethúsaogn sum liggur Stangaskákið 19 í Klaksvík. Grundstykkið er sambært tingbókini stórt 586 $m^2$.

Húsini eru sambært tryggingarskjalinum uml. 47 $m^2$ í tveimum hæddum við lofti og eru innrættað soleiðis:

Miðhædd: køkur við vanligum hvítvørum, stova og gangur.
Loftshædd: 4 sovirúm, wc og brúsa.
Kjallari: Einki er gjørt við kjallaran, sum er undir vanliga innrættingarhædd.

Til ognina hoyrir eisini ein eldri hjalsgrund.

Víst verður annars til tvingsilssøluuppstillingina, harundir skrásetingarnotat, sum er gjørt í samband við tvingsilssøluna.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, (sak nr. 4383601)**, sum kann geva upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**
10. september 2002

www.sosialurin.fo

Vit fara um alt landið
Tórshavnar Lásaservice
v/John Petersen
Umskipan
Uppseting
Systemir
Umvælingar
Lyklar
Tlf. 310 411 · Fartlf. 215 411

## Eftirlýsing

Maður, ið týsmorgunin kl. 07.45 legði út fyri ein bil ið yvirhálaði við Norðskálatunnilin, verður vinarliga biðin um at ringja skjótast gjørligt.

Um nakar førari í øðrum bili legði hendingina til merkis, verða tey eisini biðin um at ringja.

**Tlf. 252825**

Sosialurin -tað loysir seg



# HEILSANIR



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 45 ára føðingardegnum. Eisini ein heilsan til mostur. Takk fyri at tit eru so góðar við meg.
**Heilsan, Sára**



**Góða Petra**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Vit elska teg ordiliga nógv.
**Heilsan, mamma, babba, Virgar, Kjartan og Edvard**



**Góða Sunnrið**
Tillukku við 12 ára degnum ynskja
**Rógvi & Høgni**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku á 80 ára degnum. Vónandi fáa tit ein góðan dag.
**Selma**



**Kjære Ruth**
Hjertelig til lykke med dagen.
**Helsing sønn og svigerdatter**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 75 ára degnum ynskja
**Erik, Katrina og Robin**



**Góði Steffan**
Hjartaliga tillukku við 7 ára degnum í dag og alt tað besta ynskja vit tær.
**Mamma, babba, Ronni og Teitur**



**Hey Lilian**
Tillukku við 16 ára degnum. Nú fara vit at koyra. Eg gleði meg at koma heim.
**Bróðir**



**Góða mostir**
Eitt er at vera stórur og gamal, men hvat við at blíva vaksin? Tillukku við degnum.
**Suffía, Martha og Marin**



**Góði Brandur**
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi teg.
**Klemm frá mammu og babba**



**Góða Lilian**
Hjartaliga tillukku við degnum. Nú kanst tú koyra á súkkluni ha ha... Jesus pápi signi teg.
**Mamma og babba**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ..........................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«